## United ræðist okkum

Mark Hughes, venjari hjá Manchester City, sigur við enskar miðlar í dag, at grannafelagið Manchester United ræðist lítlabeiggjan Sambært honum er orsøkin fyrst og fremst stóra pengamongdin, sum Manchester City hevur til taks.
- Manchester United byrjar at síggja veruleikan nú. Vit eru til reiðar at stríðast um heiðursmerki, og tað óttast United, sigur Mark Hughes millum annað við enskar miðlar.



## Laudrup nærkast venjarastarvi

Luna Christofi, sum starvast á onside.dk, skrivar í dag, at Michael Laudrup helst verður venjari í bestu sponsku fótbóltsdeildini í komandi kappingarári. Hon skrivar, at uppflytarin Xerez og Laudrup eru í samráðingum. – Venjarin segði upp fyri tveimum vikum síðan, og tað er sannlíkt, at Michael Laudrup tekur við starvinum, skrivar Luna Christofi. Michael Laudrup hevur áður verið venjari hjá Brøndby, Getafe og Spartak Moskva.



Myndir: www.fsf.fo

# AB skrivaði søgu

**Kvinnurnar hjá AB tryggjaðu felagnum fyrsta steypasigurin í søguni, tá tær vunnu á KÍ í finaluni leygardagin**




Uni Holm Johannesen

Allar knýta nevarnar og gera eitt ýl. Frá síðulinjuni koma útskiftarar, hjálparfólk, foreldur og argjafólk tuskandi inn á vøllin at fagna leikarunum. Og tað er fyrst og fremst ein, ið tey vilja hava orðið á: Monu Breckmann.

Framherjin søkti sigursvandu KÍ-kvinnurnar, tá hon við tveimum málum tryggjaði AB fyrsta steypasigurin í søguni. Við stríðshugaðum liðfeløgunum, ið góvu seg fult út í hvørjum nærdysti, vóru fortreytirnar hjá Breckmann góðar. Og hon tók av møguleikanum.

### Lítið spæl

Og var tað ikki fyri søguskrivingina, hevði ársins steypafinala ikki staðið serliga klár hjá teimum flestu. KÍ hevur verið einaráðandi seinnu árini, og við tíðini verður nær um skrivað søga, tá tær ikki vinna.

Fótbóltsdysturin hevði lítið upp á seg. Liðini nýttu ongantíð høvið at spæla fótbólt, og talan mest var um langar bóltrar uttan bústað. Dentur var lagdur á nærdystirnar og trýstspælið, har fingurin ikki skal setast á stríðsviljan. Serliga syrgdu argjakvinnur fyri, at mótstøðuliðið hevði lítið pláss at spæla á.

### Tvær ferðir Mona

Mona Breckmann legði AB á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Hon var fyrstur á bóltinum, tá bólturin brast í tvørtræið eftir fríspark.

Argjakvinnur vóru sera ansnar í verjupartinum og dúvaðu á skjótálop. KÍ, sum hevði einstakar royndir á AB-málið, setti ongantíð mótstøðuliðið undir trýst. Serliga høvdu fleiri av stuðulsleikarunum lítið at bjóða í framrættaða spælinum.

AB vildi ikki satsa, og liðið flutti seg í útgangsstøðið aftur á vøllin eftir hvíldina. Klaksvíkskvinnurnar fingu tíð og pláss at byggja upp, har Simona Heinesen, sum stóð sera væl í AB-málinum, av álvara slapp at royna seg. Áhaldandi KÍ-trýstið gav úrslit, tá Sofía Purkhús javnaði.

Men Mona Breckmann staðfesti, at steypið ikki skuldi úr høvuðsstaðnum, tá hon aftur legði argjakvinnur á odda eftir skjótálop.

### Skrivaðu søgu

AB hevur nú vunnið fyrsta gullheiðursmerki í kvinnudeildini. Tað verður ofta sagt, at fyrsti sigurin er mest týdningarmikil. Men spurningurin er, hvørja ávirkan steypasigurin fær. Liðini eru ájøvn í landskappingini, og sum støðan er, er ikki líkt til, at hini liðini vinna stig frá oddaliðunum. Men fyrsta gullið er í øllum førum komið í hús á Argjum.



## Fantastiskt!

Tvífaldi málskjúttin Mona Breckmann var sjálvsagt ovurfegin, tá hon og liðfelagarnir høvdu fingið gullheiðursmerkini handaði. Framherjin staðfesti, at allar stríddust fyri hvørjari aðrari.

- Vit stríddust av álvara, og eingin gav skarvin yvir. Eingin fór niður við høvdinum, men vit herjaðu á allatíðina. Eg dugi ikki at seta orð á, hvør munurin var. Stríðsviljin kann ikki sammetast við seinasta dystin móti KÍ, sigur Mona Breckmann við heimasíðuna hjá AB.

Framherjin stóð fyri báðum málunum hjá argjakvinnum, og hon staðfestir, at kenslan eftir steypasigurin er fantastisk.

- Eg misnýtti ein upplagdan møguleika í fyrra hálvleiki. Men eg kendi tað soleiðis, at eg skuldi halda áfram og stríðast. Tað vísti seg at geva úrslit seinni. Hetta er sum ein dreymur hjá okkum, og tað er fantastiskt, staðfestir Mona Breckmann á heimasíðuni.

*-uni*

## Uppiborið

- Vit spældu sum eitt lið, og alt riggaði.

Lennard Pedersen skrivaði seg somuleiðis í søgubøkurnar leyardagin sum fyrsti venjarin, ið hevur vunnið gullheiðursmerki við kvinnunum hjá AB. Hann staðfestir á heimasíðuni hjá AB, at sigurin var uppiborin.

- Vit vóru til reiðar, og vístu, at vit vóru betra liðið á vøllinum. Tað var ein frálík kensla at hyggja at frá síðulinjuni. Serliga, tá ætlanarnar, vit høvdu undan dystinum, eydnaðist, staðfestir Lennard Pedersen, venjari hjá AB.

*- uni*

## Vit hava alt at tapa

Malena Josephsen staðfestir, at KÍ hevur einki at vinna í einu steypafinalu longur.

- Vit hava spælt fleiri steypafinalur seinnu árini, men tað verður lítið tosað um tað, tá vit vinna. Men nú eru fólk brádliga áhugaði, tí eitt annað lið vinnur steypið. Vit hava alt at tapa og einki at vinna, staðfestir Malena Josephsen.

Men hvørja ávirkan kann steypasigurin hjá AB fáa á stríðnum um FM-heitið?

- Tað fær onga ávirkan. Vit hava áður tapt steypafinalur og vunnið føroyameistaraheitið, so vit eru ikki í óroyndari støðu. KÍ er til reiðar at endurvinna landskappingina, sigur Malena Josephsen.

*- uni*